TILTØK

FØÐINGAR

11. oktober fingu Karina Toftegaard og Birgir av Vollanum, Signabø, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

12. oktober fingu Bjørg Ellingsgaard og Magnus Hansen, Runavík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2475 gr.

13. oktober fingu Vivi & Jóhannes Hammer, Kollafjørður, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4400 gr.

14. oktober fingu Bjarta og Jónfinn Olsen, Argir, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4510 gr.

14. oktober fingu Karin Abrahamsen og Andreas Dam, Kollafjørður, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3800 gr.

15. oktober fingu Rita og Jóhan Syderbø, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

15. oktober fingu Gunnvør og John Høgnesen, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2850 gr.

15. oktober fingu Annika Dam og Jóannes Slættanes, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.

15. oktober fingu Kristbjørg Poulsen og Valbjørn Dalsgarð, Argjum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

15. oktober fingu Ann-Margit og Jákup Joensen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3225 gr.

18. oktober fingu Halla Seyer Hansen og Pauli Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4160 gr.

18. oktober fingu Maria Heradóttir, Tórshavn, og Tórhallur Nolsøe, Nólsoy, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4375 gr.

ANDLÁT

10. oktober
Jona Davidsen, Nes, 79 ár.

12. oktober
Maria Poulsen, fødd Jakobsen, vanliga nevnd Mia, ættað úr Hósvík, búsitandi í Klaksvík, 85 ár.

Gert Poulsen, Vestmanna, 73 ár.

Turid Søltoft, fødd Lützen, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Ålborg, 93 ár.

16. oktober
Gudmund Danielsen, Nólsoy, 81 ár.

Poul Knút Hammer, í Vági, vanliga nevndur Poul í Líðini, 87 ár.

Nikolina Jensen, fødd Rubeksen, vanliga nevnd Lina, ættað úr Havn, búsitandi í Nordsundby, 83 ár.

Læknavaktir

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 20. okt.: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038
Sunnudagin 21. okt.: Andreas Petersen, tlf. 441086

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Gudstænastur
19. sunnud. eftir trinitatis
Elduvík: kl. 11 hátíðargudstænasta, Elduvíkar kirkja 50 ár. Hans J. Joensen og Uni Næs
Elduvík: kl. 17 sanggudstænasta, andakt, Uni Næs
Fríðrikskirkjan: Jónsvein Bech kl. 11, altargongd, fráfaringargudstænasta
Vestmanna: kl. 11, altargongd, Inga Poulsen Dam
Hov: Erland Beder kl. 12
Bøur: David Johannesen kl. 11, altargongd
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11
Argir: Bergur D. Joensen kl. 11
Kirkjubøur: Bergur D. Joensen kl. 12.30, altargongd. Talvan gongur í *Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi* fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
Hattarvík: Elsa Funding kl. 12
Kirkja: Elsa Fund kl. 17
Havnar kirk: kl. 11, altargongd, skriftamál kl. 10.40, Sonja Klein og Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri KFUM-skótarnar í Føroyum
Dómkirkjan: kl. 14 grønlendsk gudstænasta
Tvøroyri: Ólavur Rasmussen, altargangsgudstænasta við konfirmantum
Sandur: Jákup R. Hansen kl. 12, altargongd
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10, Niels Pauli Danielsen
Kunoy: kl. 12, altargongd, Niels Pauli Danielsen
Árnafjørður: kl. 11, altargongd, Hans Eiler Hammer
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
Christianskirkjan: kl. 11, lestur

Gudstænasta á grønlendskum
verður í Dómkirkjuni sunnudagin 21. okt. kl. 14.00
Grønlendingafelagið

Hebron, Argir
Hetta vikuskiftið hevur samkoman í Hebron samkomulegu í Zarepta. Sunnudagsskúli og øll møti avlýst vegna leguna.

»Tíð til Gud«
Úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21.00.
Gud søkir radikalar biðjarar. Aftan á verður drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Michal Bienkowski í Mariukirkjuni.

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Leygardagin kl. 16.00: Eldrasamkoma.
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting. Sunnudagin kl. 12.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti. Sunnukvøldið kl. 21.00: Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Missiónsmøti v/ YM-nevndini, samvera við sølu av heitum rætti aftaná.
Mánakv. kl. 20 venur Manskórið.

Filadelfia
Landavegur 22
Í dag kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 11.30: Barnagudstænasta, kl. 18.00: Kvøldmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 22.00: Felagsútimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúli.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 17.00: Møti.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí, kl. 17.30 bøn og kl. 18.00 møti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti í Høllini, Uppi á brekku 3.
Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin 21. okt. kl. 15.00: Fundur í KFUK við Hildibjørt Mortensen (bert fyri limir).
Mánadagin 22. okt. kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman, Filmurin Lys i mørket verður vístur. Filmurin er um ytrimissión.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Ver tilbúgvin at møta Gudi. Kl. 11.00: Gudstænasta, J. V. Danielsen.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Jógvan Johannesen.
Mánadagin kl. 20.30: Húsmøti hjá Jón og Binu.
Telefonandaktin: 424741.

Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 18.00 møti við Jóhannes Mortensen, trúboðara.

Unitum, Kollafjørður
Í dag kl. 9.00 Alpha-lega.
Mikudagin kl. 17.30–19.30: Miðdepilin. Hósdagin kl. 16.00-17.30: Urtagarðurin.

Filadelfia, Sundalagið
Í dag kl. 9.00 Alpha-lega.
Mikudagin kl. 17.30–19.30: Miðdepilin. Hósdagin kl. 16.00-17.30: Urtagarðurin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Leif Høj, open doors luttekur.
Sunnudagin kl. 17 møti við Paula Høj, barnamøti kl. 17.
Mánakvøldið kl. 20.00: Leiðaramøti við Christine Caine.
Týsdagin kl. 15.00: Kvinnumøti við Christine Caine.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Gospelkonsert
við Youth Alive verður í Ítróttarhøllini í Runavík týskvøldið 23. okt. kl. 20.00.

Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Pola Jacobsen. (Vit luttaka við møtunum á Svangaskarði leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 19.00.)

Møti á Svangaskarði
Møti verður á Svangaskarði leygarkvøldið kl. 20.00, Gigga og Hermann luttaka við sangi, ymisk luttøka við talu og vitnisburði.
Thormund Hansen og Hans Hansen

Ørkin, Saltangará
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 17.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará.
Húsmøti verður týskvøldið kl. 19.00 í Søldarfirði hjá Maybritt og Trúgva Berg.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin 21. okt.: Sunnudagsskúli kl. 14.00. Lovsangsmøti kl. 17.30. Møti kl. 18.00.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Tit skulu síggja himmalin opnan og Guds einglar stíga upp og stíga niður yvir Menniskjusonin (Jóh. 1,52).

Jóhannes doyparin hevði beint frammanundan peikað á Jesus sum Guds lambið, og tað var nóg mikið at sannføra fyrstu lærisveinarnar um, at Jesus mundi vera tann Messias,ið koma skuldi. Og hetta verður staðfest við hesum orðum Jesusar: *Tit skulu síggja himmalin opnan og einglar Guds stíga upp og stíga niður yvir menniskjasonin.* Tí tað merkir, at nú er tann himmal opin, sum áður var stongdur fyri menniskjum, at nú eru viðurskiftini millum Gud og menniskju avgerandi broytt, og at tað finst ein leið heim aftur í faðirhúsið fyri falna menniskjað. Men tá sum nú er tað Jesus Kristus, sum er leiðin, sum er vegurin, sannleikin og lívið, og tað finst eingin annar og eingin lættgongdari vegur enn hann. Og tann,ið trýr á hann, eigur lyfti hansara um ein dag at sita saman við honum í ríki hansara.

Men vilja vit fylgja hesi leið gjøgnum lívið, tá mega vit eisini vera til reiðar at gera yrkjarans bøn til okkara: »So lær meg, o Harri, at tæna tær her/ og nýta tað pund, mær er givið/ í dagligum virki, í orði og gerð/ tí bróður at hjálpa, sum veikari er/ at elska, tí tað er at liva./ Og gev mær so vist/ eitt navn, Harri Krist/ sum í tíni lívsbók er skrivað« Evnini, sum Gud hevur givið okkum menniskjum, skulu brúkast til »í dagligum virki, í orði og gerð tí bróður at hjálpa, sum veikari er, at elska, tí tað er at liva« ella sum tað stendur í danska sálminum: »At fylde med **hæderligt** virke min dag, at hjælpe og værne om den, som er svag, at elske, thi deri er livet« Yrkjarin er ikki í iva um, at hetta er Guds vilji við mannalívinum, at tað einans verður livað eftir Guds vilja, um tað er ærligt virki, hjálpsemi móti teimum,ið veikari eru, og kærleiki, sum eru lívsins eyðkenni. Her eru dagliga lívið og kristinlívið hvørki atskild ella samanblandað. Tey eru hvørt sítt, men hvørt er bundið at øðrum, og bæði verða livað fyri Guds ásjón.

Yrkjarin steðgar tó ikki her. Alt hetta er týdningarmikið, tí tað er liður í Guds ævigu ráðagerð við menniskjanum. Men sum gudgivið lív er lívið meir, enn hesin heimur kann rúma. Sæð við manna eygum endar tað ein dag, ein dag hevur deyðin boð eftir okkum. Men yrkjarin veit, at hetta er yvirsjón, tí sum tilvera okkara ein dag byrjaði hjá Gudi, soleiðis skulu vit aftur ein dag standa fyri ásjón hansara. Og eingin sleppur frá at møta. Tá verða teir stóru spurningarnir í lívinum svaraðir einaferð med alla, og allar lívsins gátur verða tá loystar; ja, sjálvt teir spurningar,ið bara vórðu settir upp á kvamsvís, tagna tá. Og tí endar yrkjarin bønina við orðunum: »Og gev mær so vist/ eitt navn, Harri Krist/ sum í tíni lívsbók er skrivað« Tá er mannalívið vorðið fullkomið aftur, tá er endamálið við lívinum rokkið, tá skoðar menniskjað tann Gud, sum er hin einasti,ið kann geva tann sæla friðin, sum hvør einasta mannasál stundar á.

Gud gevi okkum øllum ein dag at uppliva hetta. Amen.

Hans Jacob Joensen

TILTØK

Meinigheitshúsið í Sandavági
Møti sunnukvøldið kl. 18.00 v/ John S. Myllhamar, trúb.

Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Anniku við Skipá.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

Café One Way, Tvøroyri
Ert tú ung/ur og hevur hug at hugna tær í heystfrítíðini, so ert tú vælkomin til pitzzanight fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 21.00.
Í sambandi við barnamøtini í Vági koyrir bussur frá caféini kl. 17.00.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna heystfrí.
Bønarmøti verður hálvan tíma undan møtinum. Sunnukvøldið kl. 18.00 verður møti við Malinu Hentze og Ronu. Innsavnað verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting. Sunnukvøldið kl.18.00: Evangeliskur fundur. Sunnukvøldið kl. 21.00: Útifundur um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarfundur.
Týskvøldið kl. 20.00: Ungdómsfundur.
Ónskvøldið kl. 20.00: Uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Barnavikan heldur fram við barnamøtum kl. 18.00
fríggjakvøldið og leygarkvøldið í Framtíðini.
Sunnukvøldið kl. 18.00 møti fyri alla familjuna í Framtíðini. Juniorsoldátavígsla og -drekkamunnur. Búktalarin Absalon Ársgarð við familju og dukku. Dreingirnir luttaka allar dagar.
Mánakvøldið kl. 20.00: Heimaforbund.

Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR
Sunnudagin 21. okt. verður gongutúrur av Sundi til brunnin í Havnardali. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Tilmelding á Kunningarstovuni. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.

Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Reyða Kross Føroya,
Bryggjubakki 10,
100 Tórshavn
tlf. 311391/0045 22408269.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 22. okt.:
kl. 10.00-10.15: Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 10.15: Ítriv í kjallaranum kl. 14.00-18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan mikudagin tlf. 316491
Týsdagin 23. okt.:
kl. 10.00-12.00: Vit baka
kl. 10.00-11.30: Sangur - Eyðun Sørensen
Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: Frásøgn um Restorff ættina - Johann Restorff Jacobsen
Mikudagin 24. okt.:
kl. 10.00-12.00: Matgerð
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00: Vit vitja bátasvnið og viðarlundina í Leirvík. 100 kr. gjaldast frammanundan
Hósdagin 25. okt.:
kl. 10.30-11.00: Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00: Telduprát - Brandur Petersen
Fríggjadagin 26. okt.:
kl. 10.00-17.00: Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsarríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða leygardagin kl. 9.00-10.00 (roykfríur) og kl. 17.00-18.00.
Sunnudagin kl. 11.00-12.00.
Mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Al-anon
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo
–heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13-17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um ársið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Javni
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00-11.30 og hósdag kl. 16.00-17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Kristnastova
Birmavej 36, København S,
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Føroyskt møti í Ålborg
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fællershuset«á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin. flogur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19-22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 30. okt. hava Helena og Sigurð Petersen, Tvøroyri, silvurbrúdleyp. Opið hús verður í heiminum frá kl. 19.00.

Sunnudagin 4. november hava Elsa og Birgar Johannesen silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í B36-húsinum frá kl. 10.00-15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

BRÚDLEYP

21. oktober kl. 10.00 giftast í Filadelfia í Vágum, Vinjard Magnussen og Inga Skaalum Jacobsen. Veitslan er fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Miðvági.

Leygardagin 10. november kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Maiken Midjord og Eyðbjørn Høgnesen, bæði úr Klaksvík. Vælkomst verður í Skálanum kl. 19.00. Tey,ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 457656, 456036 ella 455956 áðrenn 29. oktober.

Leygardagin 8. desember kl. 14.00 giftast í Filadelfia í Gøtu Reigun Huusgaard, Syðrugøtu, og Jens Hammer, Tórshavn. Veitslan verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum. Tey,ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 25. november á tlf. 314425 ella 441378.

Týsdagin 16. oktober *giftust* í prestagarðinum á Gjaranesi Wivica Birch, Tórshavn, og Gunnar Larsen, Sebbersund. Brúdleypsadr.: Smærugøta 27.

60 ÁR

Sunnudagin 21. okt. fyllir Harald Hammer, lærari, Gøta, 60 ár. Dagurin verður hildin heima fríggjadagin 19. okt. kl. 20.00.

70 ÁR

Týsdagin 23. okt. verður Kate Hansen á Toftum 70 ár. Sama kvøld kl. 18.30 halda Ernst og Kate føðingardagar sínar í missiónshúsinum á Toftum.

Í dag, 20. oktober, verður Kristina Poulsen, Hvalba, 70 ár. Dagurin verður hildin heima.

PRÓGV

Jan Simonsen, Tórshavn, hevur á Aalborg Universitet lokið prógv sum cand.scient.adm.